# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Bjarni Olsen, timburmeistari**, ættaður av Válinum í Vestmanna, búsitandi á Argjum, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin, 73 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin kl. 13. Tey ið ynskja at minnast Bjarna, kunna lata krabbameinsfelagnum eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Edith Dahl í Havn** andaðist mánadagin 93 ára gomul.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara góða mamma, vermamma, omma og langomma

**Edith Dahl**
Tórshavn

andaðist mánadagin 25. februar, 93 ára gomul.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjakvøldið kl. 18.
Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13 úr Havnar kirkju.

*Familjunnar vegna*
**Heri, Hans Eli, Karla, Gisleyg og Katrin**

Tey, ið ynskja at senda blómur ella krans, kunnu ístaðin lata KFUK eina gávu. Konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá góði pápi okkara

**Nikael Thomsen**

andaðist og fór til jarðar.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Hoyvíkar kirkju.
Eina tøkk til B7 fyri góða røkt hansara seinastu tíð, til prestarnar Hera Joensen og Sverra Steinhólm, og til Óla Jacobsen fyri vøkur minningarorð.
Tøkk øll, sum vitjaðu, sum hjálptu til og øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Súsanna, Anna, Sølva og Ólavur**

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

# Seks maskinistar fingið prógv



Mánadagin 25. februar fingu 6 maskinistar handað prógv á Vinnuháskúlanum í Havn. Teir eru: *Bjartur í Lágabø, Dávur Berg, Eyðstein í Lágabø, Helgi Eysturberg, Júst Svínoy og John Nielsen (vantar á myndini).*

*Mynd: Ólavur Frederiksen*

# Prógv sum kondittari

Maigunn Nattestad í Miðvági hevur staðið royndina sum kondittari á Ringsted Tekniske Skole, og 15. februar fekk hon handað sveinabrævi á bakaríinum Grón í Havn.



*Maigunn (við sveinabrævinum) saman við Ann Margit Davidsen, kondittarameistara, og Sveini Thomasen stjóra á bakaríinum Grón*

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við